# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



*Nógv fólk var til móttøkuna fríggjadagin*

# Móttøka fyri nýggja stjóranum

Fríggjadagin 1. februar varð móttøka á tryggingarfelagnum Trygd í sambandi við at Jean Djurhuus hevur tikið við sum stjóri í felagnum.

Tað var fyri jól, at nevndin í P/F Trygd setti Jean Djurhuus sum stjóra.

Jean hevur starvast í Føroya Banka síðan 1991. Hann hevur havt fleiri ymisk leiðarastørv í Føroya Banka, eitt nú hevur hann verið leiðari á vinnulívsdeild bankans, og nú hann fór í stjórastarvið í Trygd, var hann leiðari á Kredittdeildini og Stjórnarumsitingini.

Jean avloysti Niels Juel Arge, sum fyribils røkti stjórastarvið eftir at Ali Celebi fór frá sum stjóri í felagnum. Jean Djurhuus tók við starvinum 1. januar 2008.



*Jean Djurhuus er settur sum nýggjur stjóri í Trygd*



*Janus Petersen, nevndarformaður í Trygd, tosar við stjórarnar í Tryggingarfelagnum Føroyar, Edvard Heen og Gunnar í Liða*

*Myndir: Trygd*

# Prát við praktikantar úr Vágs skúla

**Vit hava hitt næmingar úr 9. Flokki í Vágs skúla og spurdu tey nakrar spurningar**

**PRAKTIKANTAR**
*Olivia B. Tausen*
*og Selma Poulsen*



*Gurið Djurhuus og Helga Gleðisheygg Joensen*

*Hvussu eita tit?*
Gurið Djurhuus og Helga Gleðisheygg Joensen.
Hvar eru tit í starvsvenjing? Á Hvonn.
*Hvat hava tit gjørt hesar dagarnar?*
Hjálpt til í køkini, dekka borð, servera o.a.
*Hvussu dámar tykkum og hvat er tað besta tit hava gjørt?*
Vit dáma ógvuliga væl, og tað besta hevur verið at arbeitt í køkinum, maturin er góður og starvsfólkini eru fitt.
*Er hetta nakað tit høvdu vilja gjørt í framtíðini?*
Ja, kanska í eina tíð.
*Hvar ætlar tit tykkum næstu ferð?*
Tað vita vit ikki enn.
*Hvussu dámar tykkum í Havn?*
Okkum dámar væl, men tað er betur har suðuri.

## Dagurin

6. februar. Duruta, deyð umleið ár 300. Henda unga gentan í Kesarea í Kappadokiu vildi heldur ikki vita av einum heidnum fríggjara, sjálvum landshøvdinginum, og hann læt hana hálshøgga. Navnið Dorothea er grikst og merkir Guðs gáva.




## Andlát og jarðarferðir

**Jørna Sólgerð Grettursdóttir Mikkelsen**, ættað úr Skúvoy, andaðist á Ringkøbing Sjúkrahúsi sunnudagin, 47 ára gomul.